

*Kingo-sangur úr Tjørnuvík ljóðar eisini væl úti á dekki 7, tá lagt verður frá landi í Hanstholm*



*Lovsangsbólkurin úr Lívdini framførdi framúr góð og vælspæld løg – her í Arkaduni*



*United Voices var væl mannað og setti sín serstaka dám á gospeltúrin – bæði við sangi, men eisini við sínum fríska og góða lagi*

elkórið United Voices varð boðið við. Hetta kórið stendur fyri nøkrum av tí besta, vit eiga innan gospelsang í Føroyum.

Í samkomuni Lívdini í Hoyvík gera tey nógv við sang og tónleik, og tí var avgjørt, at ein av lovsangsbólkum teirra skuldi við á túrin.

Tveir solistar vóru eisini við: Sigrið Sivertsen sjálv sum hevði ein tónleikabólk aftrat sær, og Magni Christiansen sum somuleiðis hevði ein bólk – og fleiri cowboyhattar – við sær.

Umframt hetta var gyklarin Ásbjørn Berthelsen av Strondum við, eins og fleiri av tónleikarunum í bólkunum hugnaðu um hjá teimum, sum fingu sær at eta.

Hetta var so tann manningin, sum skuldi standa fyri tí tónlistarliga partinum umborð.

**Góð støð**

Eitt er at hava fleiri slíkar bólkar savnaðar. Eitt annað er so at finna fram til tey støðini umborð á Norrønu, sum vóru vælegnað til framførslur av slíkum slagi. Her varð rættiliga skjótt funnið fram til nøkur støð, sum vístu seg eisini at vera sera vælegnað til allar hesar framførslurnar.

Viking Club var staðið, ið varð mest nýtt, men eisini Arkadan og Naust Bar vórðu nýttar til framførslurnar, eins og undirhaldstónleikur var at hoyra í Simmer Dim og Viking Lounge.

Dekk 7 varð eisini nýtt til felagssang, tá Norrøna legði frá landi í Hanstholm, so í roynd og veru var alt skipið brúkt í samband við gospeltúrin.

Talan var um ein gospeltúr, men av tí at nógvar familjur vóru við, var eisini hugsað um børnini.

Fyrireikararnir høvdu fingið gyklaran, Ásbjørn Berthelsen av Strondum at standa fyri undirhaldinum. Og væl lá fyri hjá honum at undirhalda bæði børn og vaksin við gykli sínum.

Samanuntikið ein sera góður túrur, bæði fyri børn, ung og tilkomin. Vit síggjast vónandi aftur næsta ár!



*Magni Christiansen veit alt um country-tónleik, og hevði bæði hatt og skógvar við til høvið, her hann syngur í Naust Bar*

## Dagsskrá leygardagin 23. apríl

| | |
|---|---|
| 13:00 | Fráferð úr Hanstholm |
| 13:00 | Vit fara øll upp á dekk 7 at syngja við fráferðina |
| 14:30 | United Voices syngur í Viking Club, saman við gyklaranum Ásbjørn |
| 15:00 | Kingo í Arkaduni |
| 16:00 | Bingo í Viking Club |
| 17:30 | Kingo í Naust Bar |
| 18:00 | Holgar Johannesen spælir í Simmer Dim |
| 18:00 | Lívdin spælir í Buffet Restaurant Norrøna |
| 19:00 | Gunnar Guttesen spælir í Simmer Dim |
| 20:00 | Gyklarin Ásbjørn hevur familju-undirhald í Viking Club |
| 20:00 | Gunnar spælir í Buffet Restaurant Norrøna |
| 20:30 | Sigrid Band spælir í Naust Bar |
| 21:30 | Lívdin og Magni Christiansen hava konsert og felagssang í Viking Club |
| 24:00 | Jam Session í Naust Bar |
| 24:00 | Friends spælir í Viking Club |